# Sosialurin VARPIÐ



DR1 Leygardagin kl. 22.00

**Himmel og jord**

Talan er um seinasta partin av Vietnam-trilogi'ini hjá Oliver Stone, har teir báðir fyrru filmarnir vóru Platoon og Born on the 4th of July. Hesa ferð síggja vit kríggið úr sjónarhorninum hjá lokala fólkinum, har Le Ly veksur upp. Faðir Himmal og Móðir Jørð skapa karmarnar fyri íbúgvarnar í lítlu bygdini, men tá kríggið brestur á, verður heimur teirra kollveltur.



DR2 Týsdagin kl. 21.50

**Da Vinci koden – fup eller fakta**

Bestsellarin hjá Dan Brown hevur hugtikið fólk kring allan heimin. Tað er ein spennandi skaldsøga, men tað er eisini ein søga, sum hevur "avdúkað" ein sannleika, sum hevur fingið ilt í Vatikanið. Kom Jesus livandi av krossinum? Vórðu Jeus og Maria Magdalena gift eftir hetta og fingu børn? Kunnu eftirkomarar teirra framvegis vera millum okkum? Varð ein loynilig losja stovnað undir navninum Priority of Sion? Og skuldu limirnir í hesi varðvetia størsta loyndarmálið í kristindóminum? Tað eru nakrir av spurningunum, sum dokumentarsendingin hjá BBC hevur sett sær fyri at kanna.



3+ Mánadagin kl. 20.00

**Phone Booth**

Í New Yøork eru 8 milliónir menniskju og fleiri enn 22 milliónir telefonir. Í eini telefonboks ringir telefonin, og Stuart tekur hornið. Hann nýtir hvønn dag eina telefonboks at ringja til elskarinnuna, tí tað kann ikki gerast heimanífrá. Nú noyðist hann tó at rinda prísin fyri ólevnaðin, og frá teirri løtu, at hann lyftir horninum, hongur lívið í einum kłønum tráð. Á onkrari húsatekju situr ein maður við byrsu og kikarasikti, og boðini til Stuart eru greið. Leggur hann hornið á, doyr hann.

Canal+Film1 · Leygardagin kl. 19.00

**The Constant Gardner**

**Ein kvinna, sum hevur fingið arbeiði umvegis ávísingina, starvast innan heilvágsídnaðin í Afrika, tá hon verður myrd. Maður hennara trýr einki upp á søgurnar um, at hon hevði funnið sær ein annan, og tí setir hann sær fyri at finna útav, hvat veruliga er hent.**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**